Vegleiðing til TeenStreet tilmelding.

*Hendan vegleiðing, er gjørd til tilmeldingina fyri tannáringar, men kann brúkast til hinar eisini.*

*Stig 2 av 7:*
**Fornøvn:** Skriva øll tíni fornøvn, men set ( ) um tey nøvn, tú ikki vanliga brúkar. Um tú t.d. eitur Anita Katrina Malena Sofía Hansen, men verður kallað Anita, skriva so Anita (Katrina Malena Sofía).

**Fartelefon:** Hetta skal vera fartelefonnummar hjá luttakaranum.

**Teldupost:** Tað er týdningarmikið, at hetta er teldupostadressa hjá luttakaranum, og at hon verður kannað regluliga. Vit biða um teldupostadressu hjá foreldrunum seinni í tilmeldingini.

**Mynd:** Tað er sera umráðandi, at vegleiðingarnar fyri myndina verða fylgdar. Kanna eftir, tá myndin er upploada, um hon sær røtt út. Um myndin ikki er góð, redigera so myndina og royn aftur.

*Stig 3 av 7:*
**Vegitar:** Ja = ynski serligan mat, sum ikki inniheldur kjøt. Nei = vanligan mat.

**Heilivág:** Skriva nøgd og slag av heilivági, sum tú tekur. Panodil og líknandi verður ikki roknað sum heilivágur.

**Ferðatrygging:** Skriva tryggingarnummarið og tryggingarfelag (T.d. 241253 Tryggingarfelagið Føroyar)

**Kontaktpersónur:** Kontaktpersónur er ein, sum vit kunnu fáa fatur í, meðan luttakarin er á TeenStreet. Um foreldrini eru uttanlands, og tí ikki eru til at fáa fatur á, skal onkur annar vera kontaktpersónur.

*Stig 6 av 7:*

**CLS og klædnareglur:** Minst til at lesa hetta væl ígjøgnum áðrenn tú setur kross í at tú hevur lisið og góðtikið hesar reglur.